# Festival-dámur í oysregni

**Aftur hetta vikuskiftið var tónleikurin í miðdeplinum og savnaði fólkið. Og aftur var formurin festivalurin. Hesaferð megnaði tónleikurin tó í betri mun at savna fólk saman, enn Jóansøkufestivalinum megnaði tað. Og somuleiðis var talan um meiri festivaldám á sandinum enn tað var á Eiðinum í Vági. Hetta, hóast veðrið ikki var til vildar.**

MJÚS
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*



Fyri ein stóran part av degnum regnaði tað av grimd. Kortini royndu fólk sum best at hugna sær, og fleiri vóru væl útgjørd við termodrakt ella regnklæðum. Ein paraply hjálpti lítið hendan leygardagin.

Fleiri fólk eg prátaði við vóru mest komin fyri at lurta eftir Bonnie Tyler. Tey flestu av hesum vóru komin upp um tey tredivu árini. Helst hevur regnið hildið teimum norðanfyri frá at vitja Sandoynna, tí tey vóru einki serliga sjónlig í mongdini á sandinum, sum mundi ota seg uppum tey 1.500. Men tað var stuttligt at síggja fólk klára hugna sær í regninum. Tónleikurin, serliga Annika Hoydal við vinmonnum og The Reverends & Fríðbjørg Jensen undirhildu fólkunum væl.

### Reyðir kovboyhattar

Tóra og Tórhild høvdu tikið av og keypt sær ein reyðan kovboyhatt í part – tað er jú bara einaferð um árið at Mjús er.

– Vit hava gingið í húgvu í allan dag, tað bleiv simpulthen for keðiligt og so vóru húgvurnar eisini dýggjvátar! Nú sleit í og so keypti vit hesar fínu hattarnar, siga tær báðar við stórum smílum á.

Eg hitti tær eftir at Marius hevði spælt á lítla pallinum, nakað áðrenn Bonnie Tyler fór á pallin. Tá hevði slitið í og veðrið bleiv bara heilt gott hesa løtuna. Festivalhýrurin hevði tað lættari við at koma fram. Tær báðar hava í fleiri ár verið grannar í Skálavík. Nú býr Tórhild í Ålborg og er komin heim í summarfrítíðini.

*Hví eru tit komnar, er tað Bonnie Tyler sum dregur, ella?*

– Jú, mest Bonnie Tyler. Nei, eisini Pleaser. Teir vóru óluksaliga góðir! Tað var eisini virkuliga gott at hoyra Fríðbjørg Jensen, tað ljóðaði gott.

*Fríðbjørg Jensen ella Bonnie Tyler?*

– Oy, hatta er ein torførur spurningur. Í kvøld er tað Bonnie, restina av árinum er tað Beian!

*Hvørjum ætla tit annars at lurta eftir í kvøld ?*

– Vit ætla eisini oman til bálið at lurta eftir Jóan Jakku og Sámal Ravnsfjall.



## Í termudrakt og regnklæðum

Astrid og Betrina, stóðu væl hýrdar og prátaðu við aðrar vinkonur, meðan ein steðgur var í tónleikinum. Útsendi blaðmaðurin órógvaði tær eina løtu.

*Hvat dámar tykkum Mjús?*

– Her er deiligt! Umstøðurnar eru av tí besta, hóast tað hevur regnað illa. Sandurin her er tað besta staðið at halda ein festival.

*Men hvat við øllum regninum? Tað hevur jú regnað líka síðan festivalurin byrjaði í morgun, kl. 11.30?*

– Nei, tað bilar einki. Ein skal bara lata seg í eftir veðrinum. Tað er einki problem at ganga í regnklæðum, tað er pragtfult, sigur ein smílandi Astrid. Í teimum kann ein seta seg niður hvar sum helst. Men tað burdi verið fleiri fólk. Allíkavæl eru tey, sum eru her, í góðum lag, slær ein væl nøgd Astrid fast.

*Hvat dámdi tykkum at hoyra Fríðbjørg Jensen aftur á palli og við einum country-bólki?*

Jú, hon var góð, tað var pragtfult at hoyra. Øll sum vóru har, hugnaðu sær óført - øll sungu við, serliga til sangin "Umskylda (men eg havi bert eitt hjarta)".

*Gleða tit tykkum til at hoyra Bonnie?*

Jú, heilt sikkurt! Og tað er mest Bonnie, sum vit eru komnar at lurta eftir.



*Ymisku sølubásarnir á Mjúsfestivalinum komu við fleiri skemtiligum innsløgum. Her er eitt av teimum.*





*Bjarti stóð heilt har frammi og lurtaði eftir Bonnie Tyler. – Hon syngur ordiliga væl, segði hann.*



*Chips á bakkanum.*



*Hóast tað oysti niður, so royndu fólk flest at hugna sær. Her spæla børn sær við ánna.*



*Á tí eina av Mølheyggjunum høvdu fleiri valt at seta seg, har sat ein væl og hevði framúr gott útsýni yvir pallin og vøllin, har allar áhoyrararnir stóðu. Her uppi sótu m.a. Anna Maria, Andrias og Andrea.*

Til Fríðbjørg Jensen & the Reverends:

# Stak góður hýrur í oysandi regninum

**Fríðbjørg var sera væl móttikin av áhoyrarunum, ið stóðu trúgvir úti í tí oysandi regninum og sungu við. Sangurin "Umskylda (men eg havi bert eitt hjarta)" rungaði millum áhoyrararnar langt aftaná framførsluna og heilar tríggjar ferðir vórðu tey rópt framaftur á pallin**

MJÚS
*johan@sosialurin.fo*



Fríðbjørg Jensen var á palli saman við The Reverends, country-bólkinum. Bólkurin er vanliga mannaður við útisetum, men hesaferð vóru Ólavur Øster, gittar, og Rógvi á Rógvu, á trummum, við. Hon og sangarin í The Reverends, Niclas Thorsteinsson, tóku nakrar duettir saman, harímillum eina føroyskaða útgávu "Bye Bye Love" og "Sea of Heartbreak" hjá Cash. Tað var sera stuttligt at síggja, hvussu upptikin fólk vóru av tónleikinum, hóast tað regnaði av grimd.

### Prát við Fríðbjørg Jensen

Eg fekk eitt stutt prát við Fríðbjørg, meðan vit, sum best bar til, krokaðu við lítla pallin.

Fríðbjørg hevur ikki framført alment á henda hátt í nøkur ár eftir hondini. Síðsta útgávan var "Afturhvarv" frá 1998.

– Eg spæli regluliga undir til møtir her í bygdini, men nei, ikki soleiðis alment, á hendan mátan.

### Væl riggað samstarv

Hon lætvæl at samstarvinum við hesar ungu menninirnar.

– Sera fittir ungir menn og so líka til. Eg helt, at tað riggaði heilt væl.

### Eitt sindur óvæntað samstarv

Millum teir í The Reverends eru tveir úr grungebólkinum Mold úr Havn, sum gjørdi um seg í fyrru helt av 90unum. Fyrrverandi rocktónleikarar og ein country-gospel sangarinna, kanska heldur óvæntað. Tó, so hava hesir ex-grounge´ararnir kasta seg yvir country-tónleikin við The Reverends. Men hvussu kom hetta samstarvið í lag?

– Katrin (blm. Katrin Petersen, ein fyrireikari) spurdi meg um eg hevði hug at syngja. Hon segði mær frá hvør hesin bólkurin var, hvønn tónleik teir spældu og um tónleikurin hóskaði til mín. Og so játtaði eg. Og sum sagt, so haldi eg, at tað riggaði bara væl.

*Fólk vóru í sera góðum hýri, sjálvt um tað regnaði. Tey vóru eisini væl nøgd. Hvussu við eini fløguútgávu?*

– Jú, tað er nakað eg havi gingið og hugsa um. Og eg havi tilfar liggjandi.

*Hvussu hava tit vant upp undir Mjús?*

– Vit vandu einaferð í Margarinfabrikini í Havn. Og so jammaðu vit heima í køkinum hjá mær fyrr í dag, sigur ein smílandi Fríðbjørg.

*Hvussu dámdi tær at syngja saman við Niclasi?*

– Heilt væl, hann hevur eina ótrúliga góða rødd. Og hann dugir eisini sera væl at syngja og fylgja einum í sanginum.

*Fer hetta samstarvið at halda fram?*

– Ja, um tað skuldi verið eina aðru ferð, so eri eg klár.